# Alt er ikki happing



Tóra við Keldu

**Evnið hevur hugtikið mangan rithøvund, og hetta sæst aftur í søguni um Jósef og brøður hansara í 1. Mósebók, í Oliver Twist eftir Charles Dickens frá 18 hundrað talinum, í The Hundred Dresses frá 1944 eftir Eleanor Estes, í Gummi Tarzan eftir Ole Lund Kirkegaard frá 1975 og í About a Boy eftir Nick Hornby frá 2002 – bara fyri at nevna nakrar søgur úr ymiskum tíðarskeiðum**

Hetta vísir okkum, at happing, sum í veruleikanum er ein drepandi trupulleiki fyri nøkur, altíð hevur verið ein veruleiki.

## Happing í bólki

Í dag eru vit farin at seta orð á trupulleikan eisini vísindaliga, har ein tann fyrsta nágreiniliga kanningin um happing varð gjørd í 70unum av norska granskaranum Dan Olweus. Í dag er happing viðurkend sum heimsumfatandi trupulleiki fyri nøkur børn, ung og vaksin.

Tað er kanska sjálvsagt, at tosið um happing ofta fer inn um skúlagátt. Har eru stórir bólkar av børnum, øll hava einaferð verið næmingar og upplivingarnar eru sera ymiskar – góðar og minni góðar.

Kanningar vísa, at næmingar í happingini hava fleiri ymiskar leiklutir. Teir kunnu vera happarar, teir, sum verða happaðir ella vera eygnavitni. Hugvekjandi upptøkur av næmingum vísa, at eygnavitni vóru til umleið 85% av tilburðunum av happing, men næmingarnir blandaðu seg sjáldan fyri at hjálpa tí happaða. Leiklutirnir broytast, og tíverri gerast nakrir næmingar, sum eygleiða, hjálparar ella styrkjarar hjá happaranum, aðrir verða verandi uttan fyri, nakrir ríma, og uppaftur aðrir hyggja passivt at. Bara ein lítil partur ger nakað fyri at verja tann happaða.

Hóast tað eru dømi um skúlar, sum hava víst góð úrslit við minkandi happing, so er tað ikki eydnast allastaðni. Tí stóra avbjóðingin er at taka tað, vit longu vita um happing, og umseta tað til effektiva venjing og vilja frá heimi, skúla og í samfelagnum annars.

**Komið er ikki á mál, men um vit hyggja at londunum kring okkum, so er happing enn ein veruleiki fyri summi - sjálvt í Svøríki, har tað við lóg er bannað at happa**

## Tosa opið, men tó...

Vit eiga at leggja okkum í geyma, at allir trupulleikar í sosialum samskifti ella samveru ikki er happing. Tí kann tað eisini vera ein trupulleiki, at aðrir trupulleikar, sum næmingar hava, verða flokkaðir sum happing. Tí til dømis, at onkur kennir seg uttanfyri, at onkur hevur trupult við at finna vinir í flokkinum, at næmingar øsa seg í skúlatíð, at næmingar eru bangnir fyri at koma í skúla ella ikki vilja í skúla, er ikki altíð orsakað av happing.

**Tað er kanska sjálvsagt, at tosið um happing ofta fer inn um skúlagátt**

Kann tað hugsast, at tosað verður ov nógv um happing, heldur enn trivnað? Avgerandi spurningurin er í veruleikanum, hvussu næmingar, sum ikki hava tað gott, skjótt kunnu fáa røttu hjálpina.

Neyðugt er at taka við, at næmingarnir, sum einki kenna til happing, gerast ótryggir av at verða lagdir undir at happa – og hetta skapir enn ein trupulleika.

Trivnaður fyri næmingar verður m.a. tryggjaður, um foreldur, lærarar og vaksin annars miðvíst arbeiða við at brynja teir til eitt livandi og fjølbroytt lív saman við øðrum næmingum, har teir bæði fáa og geva. Vit kunnu tosa um likamligan og fakligan trivnað, har matur, svøvnur, fyrireiking til skúladagin og samvera er avgerandi.

## Trupulleikin óivað stórur

Í Barnaútvarpinum 19. januar varð t.d. upplýst, at umleið 1000-1200 skúlabørn javnan verða happað. Hetta er eitt stórt tal. So kunnu vit sjálvi rokna út, hvussu nógv kunnu skriva og siga sína søgu um teirra upplivingar.

Vit eru øll vitandi um, og hava verið tað leingi, at happing er ein veruleiki, og tí eru fakfólk av ymiskum slagi sett av myndugleikanum at arbeiða við trupulleikanum. Júst tí tørvar okkum eitt fjølbroyttari kjak við støði í royndum og opinleika.

Tá fólk siga frá upplivingum sínum um happing, eiga vit at fara væl um søgurnar. Júst hesar kunnu gera samfelagið meir opið fyri evninum. Tó eigur alt ikki at verða flokkað í ein bólk, tí tá kunnu søgurnar oyðileggja meir, enn tær gera væl. Dirvið hjá summum kann geva øðrum "ósekum" skuldarkenslu fyri nakað, tey als ikki kenna seg aftur í.

## Ikki komið á mál

Komið er ikki á mál, men um vit hyggja at londunum kring okkum, so er happing enn ein veruleiki fyri summi - sjálvt í Svøríki, har tað við lóg er bannað at happa. Hetta sigur okkum, at vit fara altíð at arbeiða við hesum, og vit eiga ikki at billa foreldrum ella næmingum inn, at happing er ein trupulleiki, sum fólkaskúlin einsamallur kann loysa. Hetta er ein sera samansett avbjóðing, sum allir partar mugu standa saman um. Politiski myndugleikin er eitt, men í skipanini er nógv gott fólk, og tað kann undra, at trupulleikin er so stórur, sum fólk siga?

## Hvør spyr inn til søguna?

Vinkulin, har spurnartekin verður sett við søgurnar manglar veruliga. Hetta torir eingin at gera, tí hvør veit, um tað ikki er happing? Trupulleikin er nevniliga ótrúliga torførur, har eitt upplivilsi er eitt hjá einum og eitt annað hjá einum øðrum. Menniskju eru so ótrúliga ymisk, har summi eisini hava ymiskar avbjóðingar ella manglandi sosialar førleikar.

Fakfólk - hugsi her kanska serliga um lærarar - leggja stóra orku í arbeiðið sítt, sum alt meir gerst ein sosial uppgáva. Hetta kann við nøkrum fáum orðum ella reglum verða traðka undir fótum og geva eina keðiliga kenslu av meiningsloysi, tí tagnarskyldan avlagar eisini kjakið.

## Trivnaður og virðing í fakligari skipan

Saman um tikið er tað trivnaður í fakligum umhvørvi, sum fremur tryggar og nøgdar næmingar, har tað hevur stóran týdning, at næmingar við ymiskum avbjóðingunum fáa rættu hjálpina skjótast gjørligt.

Hugsi eisini, at neyðugt er við eini hugburðsbroyting hjá teimum vaksnu, sum ávirkar hugburðin hjá børnunum. Um vaksin hava virðing hvør fyri øðrum og fakligu skipanini, so ávirkar og broytir tað børnini.

**Um vaksin hava virðing hvør fyri øðrum og fakligu skipanini, so ávirkar og broytir tað børnini**

Støðið á almenna kjakinum má gerast hægri, so tað verður eitt veruligt kjak við dýpd, har fólk oftari seta seg inn í støðuna, so evnið verður lýst frá ymiskum síðum. Um søgan stendur einsamøll, og alt verður flokkað sum sami trupulleiki, er torførari at menna verandi umstøður ella ítøkiliga at greina trupulleikan, sum sjálvsagt er neyðugt.